**NES SÓKNAR ÍTRÓTTAFELAG**
**FO-620 Runavík**
**Tlf. 448100 / Fax 448566**
**www.nsi.fo**

**STOVNAÐ:**
**24.03.1957**

**FORMAÐUR:**
**Jákup Mortensen**

**MEISTARAR:**
**Ongantíð – Besta úrslit nr. 2 í 2002**

**STEYPAVINNARAR (2):**
**1986 og 2002**

**GREIPUVINNARAR:**
**Ongantíð**

**Í 1. DEILD (18 ÁR):**
**1976, 1979, 1984-1988, 1991-1992, 1994-1995, 1997-**

**Í EUROPA (1):**
**UEFA CUP 2003/04**

# Bert meistaraheitið vantar

**NSÍ hevur seinnu árini etablerað seg í føroyska fótbóltsoddinum. Nú restar bert seinasta pettið**

**Jákup Mørk**
*jakup@sosialurin.fo*



*Jónstein Petersen er fyri stuttum farin undir aftur regluligar venjingar. Skal NSÍ enda heilt á toppinum, verður helst tørvur á kantspælinum frá ferðmikla leikaranum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er í sjálvum sær eitt sindur ófatiligt, at tað skal hava tikið somikið drúgva tíð hjá runavíkingum at fóta sær í føroyskum fótbólti.

Sum so manga staðni í Eysturoynni, so er skipaður fótbóltur hampuliga ungur í Runavíkini. Hetta hevur tó ikki verið nøkur umbering hjá flestu av hinum feløgunum í oynni, har ÍF, GÍ og B68 øll eiga meistaraheiti í bestu mansdeildini.

## Ungdómsarbeiði við úrsliti

Skal metast eftir fólkatali og landafrøði, so er tó einki at ivast í, at Runavíkin átti at verið veruligi makt-depilin í oynni, men hesa støðu vann felagið ongantíð í seinastu øld.

Nýggja øldin tykist tó hava havt broyttar tíðir við sær í so máta. Fleiri ár við miðvísum ungdómsarbeiði tykjast nú loksins at bera ávøkst, og nú er eingin, sum ivast í, at NSÍ er eitt av liðunum, sum kann fara avstað við gullinum.

Ikki minst man steypasigurin í 2002 hava givið leikarunum trúnna uppá, at tað kann bera til, tí hóast liðið einaferð fyrr hevur vunnið steypakappingina, so var tað í teimum „gomlu døgunum“ tá steypakappingin sjálvsagt hevði sítt virði. Men ikki eitt virði, sum á sama hátt sum ein Europa-Cup luttøka kann gerast upp í krónum og oyrum.

Europa Cup hevur tó nú í tvey ár verið ein av tættunum hjá NSÍ, og umframt at úrslitini á vøllinum hava borgað fyri hesum, so tykist felagið eisini uttan fyri vøllin vera til reiðar at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum altjóða kappingar krevja. Áskoðarapláss verða nú gjørd kring vøllin, og gongst eftir ætlan við UEFA-góðkenning av triðja-ættarliðs grasliki, kann NSÍ bjóða til altjóða fótbólt við Løkin í 2005, heldur enn at biðja bygdarfólkið leitað sær niðan á Svangaskarð.

## Ferðin hevur týdning

Og í nógvar mátar tykist liðið eisini vera til at tryggja hendan møguleikan.

Tá press-spælið hjá liðnum koyrir, er neyvan nakað lið í landinum, sum stendur teimum kurl. Sersakliga verða nógvir møguleikar skaptir yvir vongspælið, haðani bóltarnir verða sendir bæði djúpt innum, men eisini beint frá kantunum.

Tað er tó ein smeitur fyri liðið, at Jónstein Petersen ikki er við frá byrjan. Hann er í vetur skurðviðgjørdur fyri krossbandsskaða, og uttan ferðina hjá honum kann vongspælið gerast nakað stirvi. Kunnu ungi Andy Olsen ella arbeiðssami Eddie Mikkelsen lyfta hendan arvin, er nógv vunnið, og so kann væl vera, at fer at halda til heilt frammi í oddinum, tá stigini skulu gerast upp í september mánaði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Jens Martin Knudsen | 18/-18 | 60/0 | GÍ, Leiftur, Ayr |
| Tórður Thomsen | 0/0 | 0/0 | |
| **Verja** | | | |
| Sjurður Jacobsen | 18/5 | 1/0 | |
| Óli Hansen | 18/2 | 1/0 | GÍ |
| Messias Perreira (BRA) | 18/1 | 0/0 | B68 |
| Áki L. Hansen | 7/1 | 0/0 | |
| Johan Troest Davidsen | 0/0 | 0/0 | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Brynjólvur Nielsen | 17/1 | 0/0 | |
| Gert Langgard | 16/0 | 0/0 | LÍF |
| Jústines R. Hansen | 15/2 | 0/0 | |
| Jónstein Petersen | 14/2 | 0/0 | |
| Rúni Rasmussen | 14/0 | 0/0 | |
| Kári Hansen | 13/0 | 0/0 | |
| Andy Olsen | 12/1 | 0/0 | |
| Búgvi Olsen | 0/0 | 0/0 | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Helgi L. Petersen | 16/2 | 6/0 | GÍ |
| Bjarki Danielsen | 2/0 | 0/0 | |
| Debus Danielsen | 0/0 | 0/0 | |
| **Tilgongd** | | | |
| Eddie Mikkelsen | 0/0 | 0/0 | |
| **Frágongd** | | | |
| Ian Højgaard | 17/0 | 0/0 | Vejle |
| Sonni L. Petersen | 17/6 | 0/0 | EB/Streymur |
| Karsten From (DAN) | 6/2 | 0/0 | HB, FCM |
| Kári Sigvardsen | 1/0 | 0/0 | |
| **Venjari** | | | |
| Jógvan Martin Olsen | | | |



# Av Langanesi við langskoti

**Vinstri bakkur varð ofta fyrr mett sum eitt pláss, har teir minni góðu leikararnir gjørdi minst skaða, men í Runavík er støðan ein onnur. Hetta er tvørturímóti plássið, har ein av grundstuðlunum undir bæði álops- og verjuspælinum hjá liðnum heldur til**

**Jákup Mørk**
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av teimum mongu leikarunum hjá NSÍ, sum ikki kennir til annað stað at spæla fótbólt enn við Løkin, er Sjúrður Jacobsen.

Vinstrabeinti og álopssinnaði bakkurin við krútharða skotinum hevur í skjótt tíggju ár verið fastur fúsur á liðnum hjá Runavíkini, og hevur soleiðis upplivað allan túrin hjá felagnum. Frá seinastu niðurflytingini í 1995 umvegis uppflytingina í 1996 og til núverandi støðuna, har felagið av álvara er um at konsolidera seg sum fastur partur av føroyska fótbóltsoddinum.

## Eisini uttan útlendingar

Enn restar bert sjálvt meistaraheitið, áðrenn felagið av álvara kann roknast millum tey stóru, og hóast Sjúrður ikki fæst at siga, at tað skal verða í ár, so er einki at ivast í, at hann hevur trúnna uppá, at tað kann bera til.

Meðan hesar reglur verða skrivaðar, tykist tað tó vera eitt sindur óvist, hvussu liðið hjá runavíkingunum fer at síggja út. Í fjør hevði liðið eitt sindur av eksotiskum blóði við Messias Perreira, men í ár var so ætlanin, at landsmaðurin, Marcello Marcelinho og jugoslaviski Alexandar Jovovic eisini skuldu vera á liðnum. Meldingarnar úr innlendismálaráðnum tykjast tó benda tann vegin, at tað ikki verður so lætt at fáa hesar leikarar skrásettar í landinum, men hóast hetta, so hevur Sjúrður heilt góðar vónir til kappingarárið.

– Sjálvandi hevur hetta skapt eitt sindur av órógv á liðnum, men sjálvt uttan hesar leikarar rokni eg við, at vit fara at blanda okkum frammi í oddinum. Í øllum førum haldi eg, at tað eru onnur feløg, sum verða munandi harðari rakt av einum útlendingastoppi, og tó at breiddin so sjálvandi minkar, so hava vit framvegis ein sterkan hóp. So málið er heilt avgjørt at enda millum tey trý ovastu, heldur hann.

## Automatisman

Og hóast NSÍ hevur havt sínar trupulleikar í venjingardystunum, har úrslitini avgjørt ikki hava verið so góð, sum áskoðararnir ofta vilja hava tey, so heldur Sjúrður seg eisini hava nakað at hava vónirnar í.

– Fyrst og fremst, so hava vit eina stammu, sum hevur verið í felagnum í drúgt áramál. Vit eru fleiri, sum hava verið fastur partur á liðnum tey nógvu seinastu árini, og tað ger sjálvsagt, at tað verður ein ávís automatisma í spælinum. Hartil hava vit eisini eina 4-4-2 spælskipan, sum flestu leikararnir hava leikt eftir øll ungdómsárini, og sum teir tí eru fortróligir við. Tað kann so kanska eisini vera ein vansi viðhvørt, tí vit hava ofta sera trupult at umstilla okkum, um mótstøðuliðini leggja spælisætlanina neyvt eftir okkara. Eitt nú um tey spæla 4-3-3 og soleiðis skapa sær yvirtal á miðvøllinum, men so mugu vit bara duga betri at spæla upp á teir streingir, sum 4-4-2 skipanin gevur. Eitt nú í vongspælinum.

## Kennir plássið

Sjálvur hevur Sjúrður roynt hampuliga nógv pláss í 4-4-2 skipanini. Men tað er einki at ivast í, at hann sjálvur trívist best á vinstra bakki. Eitt pláss, sum hann hevur átt á liðnum tey seinastu nógvu árini, har hann eisini fleiri ferðir hevur sýnt mótstøðuliðunum, at hann hevur eitt knalhart vinstrabein, har bæði langskots- og frísparksperlur eru partar av innihaldinum.

Roknast skal eisini við, at tað fyrst og fremst verður her, at hann fer at gera um seg, men at byrja verður tað so uttan vanliga makkaran frammanfyri.

– Jónstein og eg hava jú fylgst allan vegin uppeftir, og tað hevur heilt klárt verið ein stórur fyrimunur. Nú verður hann so ikki klárur frá kappingarbyrjan, og tað verður heilt víst ein vansi, men hinvegin haldi eg, at breiddin í hópinum er somikið góð, at vit finna onkran at seta á liðið fyri hann.

Í venjingardystunum hava tað verið Eddie Mikkelsen og Andy Olsen, sum hava kappast um plássið, so tað sær ikki so heilt galið út kortini.

## Landsliðið er ikki gloymt

Sjálvur ætlar Sjúrður sær so ikki at gevast við sínum spæli niðan eftir vøllinum, fyri tað um makkarin fyri framman er ein annar, og umframt góð úrslit við NSÍ, so hevur hann eisini persónlig mál at røkka. Fyrst og fremst einum sessi í landsliðshópinum.

Her var Sjúrður partur av hópinum fyrsta dystin hjá Henrik Larsen, men hóast tað ta ferðina gjørdist til ein 3-1 sigur á Liktenstein, so hevur ikki verið pláss fyri honum síðani.

– Tað er heilt klárt, at tað er eitt mál, sum eg strembi eftir. Og við hørðum arbeiði, so trúgvi eg eisini, at tað ber til. Vinstra síða á landsliðnum er kanska mest opna plássið í løtuni, so tað er bara at koyra á. Og tað gevur mær sjálvum jú eisini nakað eyka at stríðast fyri.

So kanska fer landsliðið eisini at fáa gleði av hørðu diagonal-bóltunum frá bakkinum av Langanesi, og deyðbóltsstøðurnar gerast so ikki minni vandamiklar av, at tað eisini er eitt vinstrabein, sum er til reiðar at taka við.

## Metingin

Í fjør var NSÍ kanska liðið, sum skapti flestar málmøguleikarnar av øllum. Fyri eitt lið, sum stríðist í oddinum, var úrtøkan av hesum tó alt ov lítil. Tí er tað altavgerandi, at Helgi L. Petersen finnur máltevið framaftur, og at innferðarloyvi verður latið Marcello. Styrkin hjá Helga og ferðin hjá brasilska álopsleikaranum kunnu gerast lykilin til fyrsta meistaraheitið hjá liðnum.



*Sjúrður Jacobsen var partur av fyrsta landsliðshópinum hjá Henrik Larsen, og sjálvur hevur hann avgjørdar ætlanir um at sleppa upp í part aftur sum skjótast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*